

*Hans Jacob Glerfoss var málari og yrkjari. Fyri 10 árum síðani arbeiddi hann við hesum verkinum av seinastu kvøldmáltíðini*

**MYND:** JENS KRISTIAN VANG

# Glerfoss-verk á vegginum í Klaksvík

UM VIKUSKIFTIÐ VERÐUR **LISTAFRAMSÝNING** TIL HEIÐURS FYRI **HANS JACOB GLERFOSS**, SUM DOYÐI Í JANUAR MÁNAÐI Í ÁR



**LISTAFRAMSÝNING**

**Eyðun Klakstein**
eydun@sosialurin.fo

Leygardagin letur upp forvitnislig listaframsýning í Klaksvík. Norðoya Listafelag skipar fyri framsýning av verkum hjá Hans Jacob Glerfoss, sum doyði fyrr í ár. Listafelagið hevur útvegaða verkini, sum fara at hanga á vegginum í Skúlanum við Ósánna.

Hans Jacob Glerfoss var føddur í Mikladali, men vaks upp í Kunoy. Hann búði virknastu ár síni í Klaksvík. Hans Jacob Glerfoss telist millum kendaru føroysku listamálararnar seinastu 40 árini.

Hans Jacob Glerfoss var sjálvlærdur listamaður, og miðskeiðis í 1960'unum var hann við á fyrstu framsýningunum. Eisini hevði hann serframsýningar í Føroyum og í Danmark, og hann var við á ferðandi framsýningum saman við øðrum.

### Virkin listamaður

Hans Jacob Glerfoss málaði nógvar landslagsmálningar, har myndaevnini ofta vóru úr norðoyggjum. Hann málaði eisini fólk til arbeiðis, útróðrarmenn og handverkarar, ella í veitslulag. Hann var eisini frálíkur teknari og hugaligt er at síggja tekningar hansara, sum stundum eru forarbeiði til málningar, har ymiskar viðmerkingar eru settar á.

Hans Jacob Glerfoss yrkti eisini nógv. Í 1969 fekk hann M.A. Jacobsens heiðursløn fyri yrkingasøvnini.

Hans Jacob Glerfoss búði nógv ár í Klaksvík, og hann helt eisini til í Havn onkur skifti. Miðskeiðis í 1990'unum fluttu hann og konan til Danmarkar at búgva, har tey trivust væl í Hirtshals.

Listamálarin og yrkjarin úr Mikladali doyði á sjúkrahúsi í Hirtshals 17. januar í ár – Hans Jacob Glerfoss gjørdist 72 ára gamal.

Listaframsýningin í Klaksvík letur upp leygardagin kl. 16.00.

## INNIHALD

4 SAMRØÐA: **MALAN OG ÓLUVA Á LOFTI**
7 TIPS: **FÍNAR FØTUR Í SUMMAR**
8 90 SEKUND: **EYÐUN NOLSØE**
10 SAMRØÐA: **MAGNUS TAUSEN**
12 REPORTASJA: **KITTY MAY GERST YNGRI VIÐ BOTOX**
14 TIL ARBEIÐIS: **OLFA TRABELSI Á MATSTOVUNI ZITOUNA**
15 UMAFTURAFTURUM: **HØGNI DJURHUUS**
16 REPORTASJA: **HEIMSINS FJÓRÐSTØRSTA VATN TORNAR UPP**
18 INTERVIEW: **BRIAN HEAD WELCH**
19 MÍN BESTA UPPSKRIFT: **RULLUSTEIK**
23 TAÐ HENDUR: **KONSERTIR, BØKUR, SENDINGAR OSFR**
24 VIKUMYNDIN: **BESTA MYNDIN Í VIKUNI**

## KLUMMAN



*Eyðun Klakstein*

# Lat tað bara regna í summar

Hetta verður eitt gott summar. Og tað er líkamikið, um sólin kagar fram síðst í juni, ella um hitastigini verða tveysiffrað onkra løtu í juli, so at Weber grillini kann trillast út í tún og standa har í tveir tímar, áðrenn hon má flýggja undan regninum aftur.

Fimm túsund sjeyhundrað og trýss minuttir við HM fótbólti bíða fyri framman. Og allir minuttirnir eru líka spennandi. Allir.

Fyri summi er tað ein líka stór hending, at Honduras og Sveis spæla HM-dyst í 1200 metra hædd í Bloemfontein, sum tá fíggjarmálaráðharrin við álvarsomum andliti leggur fram eina fíggjarætlan við einum halli á eina slaka milliard krónur.

Og ein komandi fiburspreinging hjá Steven Gerrard fer nógva staðni at elva til størri høvuðbrýggj, enn struktueralla hallið í føroyska samfelagnum nakrantíð fer at gera.

Fríggjakvøldið um eina viku verður lagt til brots í Suðurafrika, og eftir at Suðurafrika og Meksiko hava spælt fyrsta dystin í endaspælinum um heimsmeistaraheitið í fótbólti, bíða 63 dystir eftir at verða spældir – og sæddir. Sjónvarpsrásirnar spíla seg út við beinleiðis varping av øllum teimum 64 dystunum, og vit eru nógv, sum fara at sita har og hyggja og síðani bíða til næsta dyst, tá vit aftur kunnu hyggja.

Størsta ítróttarkappingin í heiminum ger summarið til nakað heilt serligt, og kvinnurnar, sum kanska í minni mun hava áhuga fyri fótbólti, kunnu heldur ikki klaga.

Í gjárkvøldið var nýggi Sex and the City kvinnufilmurin frumsýndur, og um vikuskiftið sleppa kvinnurnar at renna kvinnurenning, tey kalla. So hetta summarið bjóðar ikki bara HM-fótbólt, tað bjóðar eisini javnstøðu. Tí tá kvinnurnar í eina viku hava brúkt tíðina til perfumufilm og kvinnurenning, hava menninir ein mánað við HM-fótbólti.

Og tað eru longu nógv sum stúra fyri 11. juli, tá ið HM-finalan verður bríkslað av.



VIKUSKIFTI
**Redaktørur:** Inna Törnroos
**Útgevari:** Sosialurin, www.sosialurin.fo
**Umbróting:** Sosialurin · **Høvuðssniðgevi:** Pætur Eyðunsson Jensen
**Forsíðumynd:** Malan og Óluva á Lofti / Mynd: Jens Kristian Vang